## DAGSINS MEINING

# Flyta í miðbýin

Fyri stuttum varð leigusáttmáli undirskrivaður millum Sosialin og eigararnar av bygninginum, har handilin hjá Valdemar Lützen hevur hildið til í Vágsbotni í mong mong ár. Nú verður so arbeitt við at gera hesi gomlu og spennandi hølini klár til at hýsa einum blað, ella rættari, fjølmiðlahúsinum Sosialinum.

Tá hølini vórðu lýst til leigu mettu vit á blaðnum, at hetta var vert at royna. Um ikki annað so at spyrja um. Og so væl vildi til, at semja fekst við eigararnar um, at hesin søguligi bygningur, fyrr Rybergshandil, hereftir skal vera fjølmiðlahús. Tí eru vit á blaðnum takksom fyri og vilja gera okkara fyri at varðveita húsini í tí standi tey eiga at vera í umframt at geva okkara íkast til menningina av høvuðsstaðnum.

Mangir lesarar og viðskiftafólk hava spurt, hvussu stór broytingin verður og nær flutt verður. Arbeitt verður við umbyggingini hvønn dag og vóna vit at kunna flyta inn í hølini í Vágsbotni í februar ella í mars næsta ár.

Hvat broytingum viðvíkur, so verður tað sjálvandi nakað, sum fyrst fer at síggjast og merkjast eftir at flutt er í miðbýin. Tað er greitt, at tað gevur nógvar nýggar møguleikar, tá eitt blað, sum roynir at menna seg til eitt fjølmiðlahús, kann flyta inn í høli, sum longu frá byrjan av eru innrættað til endamálið.

Høvuðsdenturin fer framhaldandi at verða lagdur á blaðútgávuna og er ætlanin at høvuðsredaktiónin í miðbýnum í Havn skal kunna arbeiða væl saman við lokalu redaktiónunum úti um landið og tí rullandi redaktiónini, sum meira verður at síggja til í komandi ári.

Men aftrat hesum fara vit so eisini eftir førimuni sjálvsagt at menna aðrar uppgávur og avbjóðingar, sum hoyra einum fjølmiðlahúsi til. Her verður hugsað um internetið, loftbornar miðlar oa. Í hvønn mun og hvørjar og hvussu nógvar uppgávurnar verða á hesum økjum vil so bara tíðin vísa, men vit fara so sum eina byrjan og sum eina íløgu inn í framtíðina at skapa neyðuga grundarlagið fyri at kunna taka ímóti nýggjum avbjóðingum.

Tað skal vera vón okkara, at FJØLMIÐILIN í miðbýnum í hjartanum á Havnini og Føroyum kann vera við til at at menna og skapa eitt livandi umhvørvi har og at ringarnir frá virkseminum kunnu røkka út um alt landið. Tíðin vil so vísa, hvørjir aðrir og nýggir møguleikar kunnu vera til steðar, tá eitt fjølmiðlarhús brádliga gerst veruleiki í Vágsbotni, her eisini á tí mentanarliga økinum. Livst so spyrst.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Hvar er virðingin?

**Lisbeth L. Petersen**
*løgtingslimur*



**Tey, ið hava hug at fylgja við í hvat hendir í tingi, og hvat har verður sagt, hava møguleikan, nú sent verður beinleiðis gjøgnum Sjónvarp Føroya teir tímarnar um dagin, tá annað ikki er á skránni.**

Ikki kann sigast, at orðalagið altíð er so sømiligt.

At vit eiga góðar røðarar, ið eru alt annað enn keðiligir at lurta eftir, skerst ikki burtur, og gott er tað, tí tað ger onki um nakað av undirhaldi eisini er við, men tingmannastarvið er eisini ábyrgdarfult. Veljarin, t.v.s. fólkið, hevur sett tinglimirnar í starv, og veljarin hevur somuleiðis møguleikan at koyra teir tinglimir úr starvi, sum hann ikki er nøgdur við.

**Spurningarnir**
Seinastu tíðina tá munnligir spurningar, bæði fráboðaðir og ófráboðaðir, hava verið á skránni hvønn mikudag, eru nógvir tímar farnir við kjaki, ið er endað í persónligum brigsli og beinleiðis útspilling av bæði øðrum politikarum eins og persónum, ið ikki hava havt møguleikan at svara aftur.

Støðið hevur í summum førum verið óvanliga lágt.

Hvat sigur veljarin nú? Hvørja meining hevur hann um, hvar støðið skal verða, og hvar markið gongur?

At møguleikin at seta spurningar eiga at vera rættindi í einum demokratiskum landi og dømi um opinleika í politiska umhvørvinum, kunnu vit skjótt semjast um, men verður hesin møguleiki kanska misnýttur?

**Fólkatingið**
Annars er at siga, at á fólkatingi verður somuleiðis ein dagur um vikuna brúktur til spurningar, har spurt verður um næstan alt, sum spyrjast kann um, og har er sama skilið, at tað er andstøðan sum brúkar henda rætt til at markera seg. Sum eg havi upplivað tað, so er orðalagið harniðri tó ikki á so lágum støði sum herheima, hóast orðini kunnu vera sera hvøss til tíðir.

Nú eru danskir ráðharrar farnir at tosa um, at tað ongum líkist, at tíðin á tingi, har ríkiligt annað er at takast við hjá bæði ráðharrum og embætismonnum, skal brúkast til at svara spurningum og at gera stórt fyrireikingararbeiði í sambandi við hesar, tá heilt týðiligt er, at spurt verður ofta bara fyri at spyrja.

Hvat siga vit herheima? Halda vit at støðið er virðiligt? Ella hevur føroyski veljarin onga meining um tað?

# Granskingin skal raðfestast

**Annika Olsen**

Gransking er eitt átroðkandi evni í føroysku fjølmiðlunum í løtuni, og í nýggja blaðnum Vinnuvitan verður evnið gransking viðgjørt í nærum øllum greinunum í blaðnum. Hetta er eitt tekin um, at áhugin fyri granskingini alsamt vindur uppá seg í Føroyum. Tí er tað átrokaðandi, at politikarrin taka tey neyðugu stigini til, hvussu føroyski granskingarpolitikkurin skal skipast. Tað sær tíverri út til, at gransking ikki verður politisk raðfest, tí at játtanirnar til granskingina verða alsamt niðurskornar, og er hetta ein skeiv gongd fyri tað føroyska samfelagið og føroyska búskapin. Aðrastaðni í heiminum verður granskingin raðfest høgt, tí mett verður, at hon kann skapa øktar inntøkur, fleiri arbeiðspláss og harvið størri vælferð og trivna.

Fiskivinnan hevur hildið lívið í føroyingum, og eiga vit at virða hesa vinnu høgt, men vit mugu eisini síggja í eyguni, at hon møguliga ikki kemur at verða okkara høvuðsvinna í framtíðini. Vit mugu ikki stirna í vanahugsanini, men heldur lata eyguni upp fyri øðrum vinnum í Føroyum. KT vinnan er í stórari menning, og um rætt verður borið at, so kann granskingin innan eitt nú KT geva føroyska búskapinum eina saltvatnsinnspræning. Henda innspræning kemur sjálvandi ikki eftir einum degi. Tað krevur ein yvirskipaðan granskingarpolitikk, eina langsiktaða ætlan um, hvat man vil og ikki minnst, at politikarnir trúgva uppá granskingina og harvið eru sinnaðir at játta pening til sama.

Spurningurin er so, hvussu vit fáa ein yvirskipaðan granskingarpolitikk. Fyri tað fyrsta er tað neyðugt, at vit gagnnýta tað vitanartilfeingið, vit hava í Føroyum. Sjálvt um vit ikki hava nakað akademiskt lestrarumhvørvi, so eigur Fróðskaparsetur Føroya at fáa ein størri og meira virknan leiklut innan granskingina, og ljós skal varpast á tað vitanartilfeingið, ið serliga er at finna á náttúruvísindaligu deildini. Gransking og tann akademiska vitanin gongur hond í hond, og tískil er eisini neyðugt at fáa eitt tættari samstarv her. Um Fróðskaparsetur Føroya verður flutt niðan á Marknagil saman við Miðnámsskúlunum, er tað størri møguleiki fyri, at vit fáa eitt rættiligt lestrarumhvørvi í Føroyum, og hava vit eitt lestrarumhvørvi, er tað eisini meira eggjandi fyri næmingar á hægri lærustovnum í øðrum londum at leita sær til Føroyar at lesa. Hetta kann vera við til, at vit fáa eitt meira flølbroytt akademiskt lestrarumhvørvi í Føroyum.

Eitt annað samstarv, ið granskingin eigur at hava, er við vinnuna sjálva. Tað er vinnan, sum vísir á ein tørv, sum granskingin kann nøkta, um tað so er innan fiskivinnu, biotøkni, KT, hátøkni ella ráðgevaravirksemi.

Fyri at samstarvið millum granskingina, skúlaverkið og vinnuna skal eyðnast, eiga vit at fáa ein granskingardepil, ið sjálvsagt eigur at liggja tætt við ein hægri lærustovn, eitt nú Fróðskaparsetur Føroya. Í hesum granskingardepli skulu starvast fólk við leiðsluroyndum, royndum frá vinnulívinum, fólk við vitan innan ráðlegging og umboð fyri bankarnar, sum kunnu stuðla góðum og innovativum granskingartiltøkum. Harafturat eigur depilin at hava ein framtíðargranskara, ið kann meta um, hvørjar vinnur fara at gera seg galdandi í framtíðini. Tíðin er búgvin til, at Føroyar kunnu gerast ein granskingartjóð burturav.




Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.